# - Demokratiið skal altíð seta spurnartekn við seg sjálvt

**Mikukvøldið skipar Demos fyri fundi, har fólkaræði verður viðgjørt. Ein av luttakarunum er John Steen Johansen, ið metir, at teinurin frá borgara til tey støðini, har avgerðirnar verða tiknar, kann tykjast at gerast longri og longri.**

**- Hvørt ættarlið skal taka sær fólkaræði, sigur hann**

KJAK OG UPPLÝSING
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*John Steen Johansen, ið fer at viðgera demokrati í Miðlahúsinum mikukvøldið*

Ein teirra, ið fer at røða á fundinum mikukvøldið, er lærarin, sálarfrøðingurin og rektarin á norðurlendska fólkaháskúlanum í Genève, John Steen Johansen, ið hevur verið í Føroyum seinastu vikuna og m.a. havat fundir við fakfeløgini um fólkaræði og upplýsing. Hann greiðir frá, at hann ætlar at halda ein fyrilestur, ið skal birta kjak hetta kvøldið.

John Steen Johansen sigur, at eftir at tey stóru norðurlondini hava gjørt sokallaðar stórar útgreiningar av valdinum og hvør hevur maktina í hesum londum, hevur verið hildið, at hetta kanska hevur verið heldur akademiskt og torskilt. Tí metir hann tað vera neyðugt, at kjakast verður um hetta.

M.a. nevnir hann bólkar sum t.d. eldri fólk, brekað og pensjónistar sum heild, ið kunnu verða við skerdan lut, har avgerðirnar skulu takast.

Í hesum sambandi er vert at nevna tað fína orðið "sosialkapitalur", sum John Steen Johansen málber seg, ið merkir, at tilfeingi er at finna í øllum samfelagsbólkum.

- Samfelagið skal ikki útihýsa, men inkludera, sigur John Steen Johansen.

### Koma ongantíð á mál

Fyrilestrahaldarin sigur, at vit verða ongantíð liður at viðgera demokrati, og sigur, at hvørt ættarlið skal taka sær fólkaræði.

- Um demokratiið skal rigga væl skal tað allatíðina seta spurnartekn við seg sjálvt, sigur John Sten Johansen

Í hesum sambandi nevnir hann Grønland, har mett verður, at teinurin til valdið verður longri hjá fleiri og fleiri fólkum, og at tað tykist alt meira, sum tað er ein lítil elita, ið tekur avgerðirnar. John Steen Johansen nevnir eisini kommunalendurskoðanina Í Danmark, har kommurnar eru nógv færri í dag, og tí verða tað færri og færri, ið umsita síni egnu fíggjarætlanir.

- Vit skulu ikki allatíðina taka støðu til landspolitisk mál, men eisini viðgera, um t.d. skulu hava eitt ungdómshús, sigur John Steen Johansen, ið vísir á, at hann heldur tað vera týdningarmikið, at ein kannar frá einum fólksligum sjónarhorni, hvussu fólkaræðið virkar.

Umframt John Steen Johansen fer Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóri í Tórshavnar Býráð, at røða um demo- og Jenny Lydersen og Olaus Jespersen úr Mentamálaráðnum fara at tosa um m.a. lívslanga læring. Hildur Patursson verður fundarstjóri.

## FAKTA

Mikukvøldið bjóða Demos 2007 Føroyar, sum er Upplýsingarfelagsskapur Verkamanna, Norðpluss-Vaksin, Mentamálaráðið, NLV og onnur til orðaskifti um, fólkaupplýsing, fólkaræði og virknan medborgaraskap. Demosverkætlanin er íbirt av norðurlendsku maktog demokratifrágreiðingunum og norðurlendsku fólkaupplýsingarsiðvenjuni við opnum og beinleiðis samrøðum um týdningarmikil evni.

# Hvat vilja vit við Fólkakirkjuni?

**Herfyri vóru samráðingarnar við donsku stjórnina um yvirtøkuna av Fólkakirkjuna lidnar. Men hvat vilja vit føroyingar við Fólkakirkjuni, nú vit sjálv skulu umsita hana? Hetta verður evnið á Trapputinginum í Miðlahúsinum í annaðkvøld**

KJAK OG UPPLÝSING
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Í annaðkvøld verður skipað fyri Trapputingi um ta ætlaðu yvirtøkuna av Fólkakirkjuni, og hvat vit ætla við henni, nú hon væntandi verður føroyskt málsøki.

Higartil hevur arbeiðið við at yvirtaka kirkjuna mest gingið fyri seg á politiskum og á embætismannastigi, men í annaðkvøld kl. 20 bjóðar Sosialurin til Trapputing, har ætlanin m.a. er at kjakast um, hvat føroyingar ætla við kirkjuni framyvir.

Ovastu myndugleikarnir í kirkjuni hava ikki mett, at teir altíð hava verið nóg væl við í gongdini. Ikki minst hevur verið fýlst á, at ikki alt verður liðugt á ólavsøku, tá ætlanin er at yvirtaka kirkjuna.

Ein annar spurningur, ið ætlanin er at taka upp á Trapputinginum, er, hví vit yvirhøvur skulu yvirtaka kirkjuna, tá sagt verður úr Mentamálaráðnum, at ætlanin er, at bygnaðurin skal broytast minst møguligt. Eisini verður spurt, um tann evangelisk-lutherska læran framvegis vard av donsku grundlógini, ella verður hon framyvir bert staðfest við løgtingslóg, sum 17 tingfólk kunnu broyta?

Og er tað yvirhøvur ein dygd, at so nógv fólk arbeiða nógv leikfólk ólønt í kirkjuni, ella hevði góðskan á t.d. urguspæli og sálmasangi verið betri, um lønt fólk stóðu fyri hesum í øllum kirkjum?

### Orðið verður frítt

Ætlanin var at fáa avvarðandi landsstýrismann á økinum, Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharra, at vera við pallborðið, men hetta lá tíverri ikki fyri hjá honum. Í staðin fer Poul Michelsen, limur í politiska fylgibólkinum, at umboða samgonguna. Hinir luttakararnir verða Annita á Fríðriksmørk, andstøðutingkvinna og limur í politiska fylgibólkinum, Jens Mortan Mortensen, formaður í Urguleikarafelagnum, og Jákup Reinert Hansen, formaður í Prestafelagnum og limur í kirkjuliga fylgibólkinum.

Annars verður høvi hjá fundarfólkinum at koma við sjónarmiðum og spurningum. Orðstýrari verður Jón Brian Hvidtfeldt.

## Fyrilestur um fólk við menningartarni og sálartrupulleikum

**Miðlahúsið verður í kvøld karmur um fyrilestur um fólk við menningartarni og sálartrupulleikar**

FYRILESTUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Í kvøld kl. 19 skipa Javni, Pedagogfelagið og Psykiatriski depilin fyri fyrilestri um fólk við menningartarni og sálartrupulleikum. Fyrireikaranir hava heitt á Anette Løwert, sum hevur arbeitt við fólki við menningartarni og psykiskum trupulleikum í nógv ár, at halda fyrilesturin og ætlanin er, at hon skal virka sum konsulentur fyri Psykiatriska depilin á hesum øki.

Seinastu 17 árini hevur hon verið yvirlækni í psykiatri í Vejle og hevur seinastu 15 árini havt ábyrgdina av viðgerðini av sálarligum trupulleikum hjá fólki við menningartarni í Vejle Amt. Seinastu trý árini hevur hon eisini verið konsulentur á hesum øki í Norðurjútlandi.

Harumframt situr hon í ymsum ráðum og nevndum, sum hava havt við hesi viðurskifti at gera.

Anette Løwert er útbúgvin kliniskur sexologur og hevur undirvíst bæði í psykiatri og sexologi fyri sjúklingar, avvarðandi og fakfólk í Danmark, Noregi og Grønlandi.

### Størri títtleiki hjá fólki við menningartarni

Psykiskir trupulleikar vísa seg at koma oftari fyri hjá fólki við menningartarni enn hjá øðrum. M.a. kann talan vera um depressiónir, angist og at tey eru psykotisk. Av tí at munur er, í hvønn mun fólk kunnu hava menningartarni, er eisini munur á. hvussu tey fáa víst hetta.

Í drúgva tíð var fólk við menningartarni ikki eitt evni, ið psykiatriin setti í beinleiðis samband við sálarligar trupulleikar. Hetta gjørdi seg serliga galdandi í sjeytiárunum. Av tí sama datt ein stórur partur av serkunnleikanum á hesum øki burtur, og hetta verður so roynt at byggja upp aftur, og hetta hevur Psykatriski depilin m.a. sett sær fyri at bøta um m.a. við at fáa samsatrv í lag við Anette Løwert.